# Kjak



**Levi Mørk**
*námsfrøðingur og javnaðarmaður*

## Ræðumyndin er fólkaminking!

Nú tá ið sáttmálasamráðingar eru millum tey 5 fakfeløgini í almenna fakfelagssamstarvinum, Føroya Lærarafelag, Føroya Pedagogfelag, Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, Havnar Arbeiðskvinnufelag og Starvsmannafelagið.

Eg takið fult undir við at okkara pedagogiska øki og fakfelagsrørslan, fær lønarhækking.

Eg haldið at tað er púra burturvið, at landið t.e Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, ikki kunnu ganga við uppá eina lønarhækking til fakfelagsrørsluna. At bjóða eina nullloysn til fakfelagsrøðsluna er fullkomiliga langt úti og tænir ikki til nakað íkast til okkara samfelag.

Føroyskir námsfrøðingar fáa sum nú er ikki góða løn og at fara at bjóða teimun eina nullloysn, kann eg undir ongum umstøðum góðtaka.

Skerjingarnar í komandi fíggjarætaln hjá landinum, er bert at gera støðuna verri hjá tí vanliga fólkinum, tí allir hesir skattir, sum vera sum lagt oman á fólkið er drepandi. Vit skulu heldur geva nakað eftir og stegað sparinginum og harvið fáa vit gongd á fíggjarhjólini aftur.

Síðani kunnu vit hyggja frameftir, tað er skilagóður fíggjarpolitikkur. Eitt er vist um tað sum nú fer fram í okkara samfelag, kemur av hava hópflyting av landinum við sær og tað er tann ræðumyndin sum eg stúri fyri.

Tí um verkfall verður fer tað ikki at tæna nøkrum av pørtunum. Vit vit øll hvussu illa stødd fólkið verður, bæði við atliti til sjúkrahúsverkini, barangarðar og okkara skúlaøki, tað eru børnini og tey veiku sum eitt verkfall fer at raka mest.

Samstundis haldi eg at báðir partar skulu taka atlit til útjaðaran, havi sjálvur búð í Vági í 27 ár og minnist væl, hvussu avskorið tað var, tá ið verkføll vóru í fleiri vikur uttan nakað ferðasamband við meginøki.

Hetta fer serliga í hesum tíðum at gera stóran skaða í Suðuroy og í Sandoy. Tí eri eg ímóti at td. Smyril verður lagdur. Men, hinvegin má eitt møguligt verkfall geva úrslit sum flyta mørk. So, nemt er tað ikki.

Vit hava øll merkt sviðan av heum sparingum og tað hevur gingið út yvir okkara veiku, t.e er eldri og okkara børn.

Fari tí at heita á fíggjarmálaráðið og kommunala arbeiðsgevarafelagið, um at ganga við til ein skilaloysn og at geva eina lønarhækking til fakfelagsrørsluna.



**Høgni Hoydal**
*form. í Tjóðveldi*

## Um at javnseta økini í landinum og rættstundis umhugsni

Suðuroyarportalurin ringdi og spurdi: Tekur tú undir við eini lóg í eini verkfals-/verkbansstøðu, har økini í landinum verða javnsett? Tá svaraði eg, og helst fleiri við mær: Taki undir við at økini mugu javnsetast, men tað skal ikki gerast við lóg í eini arbeiðsósemju.

Tjóðveldi hevur fingið formliga áheitan frá Suðuroyar Tjóðveldisfelag, eins og Sandoyar Tjóðveldisfelag alment hevur gjørt var við seg, um tað ólukkuligu støðu, at eitt møguligt verkfall ella verkbann, rakar økini í landinum so ójavnt. Samferðslan til bæði Suðuroyar, í Sandoynna og til Nólsoyar verður avskorin, og harvið verða hesi øki í minsta lagi tvífalt rakt av avleiðingunum av arbeiðssteðgi á almenna arbeiðsmarknaðinum.

Havi eisini tosað við og samskift umvegis teldu við stórt tal av suðuroyingum, sandoyggjafólki og nólsoyingum.

Og tað er sjálvandi sera væl skiljandi, at fólk gera vart við seg og grundgeva greitt og klárt fyri hesum ójavna – og vísa á avleiðingarnar fyri vinnulív, fólk og familjur.

Tað er eisini upplagt, at Suðuroyarportalurin tekur málið upp og setur nøvn á teir politikarar, ið vilja løggeva í eini verkfalsstøðu, soleiðis at skipini kunnu sigla.

### Miðstaðarpolitikarar móti útjaðara?

Í slíkari støðu mugu vit eisini smyrja okkum við, at vit sum siga greitt nei til við lóg at fara inn í ein lógligan arbeiðssteðg, verða løgd undir at vera miðstaðarpolitikarar, sum ikki vilja hinum økjunum í landinum væl.

Meðan aðrir politikarar við landsstýrismanninum í arbeiðsmarknaðarmálum á odda, nú knappliga skulu vísa atgerðarmegi og siga seg vilja leggja lógaruppskot fram, tveir mánaðar eftir, at sáttmálarnir fóru úr gildi. Og tað er jú lætt at koma sum ketta burturúr høvdatrogi, fimm minuttir í tólv og lova eitthvørt. Vit kundu spurt, hvat forðar teimum í at gera tað í samgonguni, um tað er hetta sum landsstýrismaðurin vil?

Tori at siga við vissu, at landsstýrismaðurin og tey, sum siga seg stuðla honum í hesum, hava onki lógaruppskot klárt, soleiðis sum annars verður gyklað fólki fyri. Og tey bíta negl, um arbeiðssteðgur skuldi íkomið, tí so verður avdúkað, at onki lógaruppskot kemur um hetta. Tí hví er uppskotið so ikki lagt fram enn?

Ímeðan kunnu fólk so spyrja andstøðuna á tingi og onnur løgtingsfólk – heldur enn at spyrja løgmann og onnur í landsstýrinum, sum hava møguleikan at gera nakað veruligt við eitt slíkt mál. Vit kundu sjálvandi valt at svara uttanum, men svara, tá vit høviskliga verða spurd um eitt prinsippielt mál.

### Skeiv adressa

Men adressan er altso skeiv. Málið um samráðingarrætt og verkfalsrætt á arbeiðsmarknaðinum, og hetta at javnseta økini í landinum viðvíkjandi samferðslu, skal loysast við samráðingum millum partarnar á arbeiðsmarknaðinum, áðrenn arbeiðssteðgur kemur í. Og í hesum føri er landsstýrið annar samráðingarparturin.

Núsitandi landsstýrismaður í arbeiðsmarknaðarmálum, Jóhan Dahl, hevur havt trý ár at loysa málið. Og undan honum hevur hansara samgonga við 21 tinglimum havt onnur fýra ár at fáa eina avtalu í lag – ella at løggeva, um orð teirra skulu takast fyri fult.

Eftir seinastu arbeiðsósemju í 2003 –sum tá var á privata arbeiðsmarknaðinum – boðaðu allir flokkar frá, at hetta mál mátti loysast við samráðingum og málið var fleiri ferðir umrøtt á tingi. M.a. tók núverandi løgtingsformaður, Hergeir Nielsen, málið staðiliga fram.

Tá á fyrsta sinni ein 4-ára sáttmáli varð gjørdur á almenna arbeiðsmarknaðinum í 2006, vóru allir møguleikar til stundir at samráðast um ein so grundleggjandi spurning.

Tí sjálvsagt er tað so – eins og gjørt hevur verið á øðrum arbeiðsmarknaðarøkjum – at um fakfeløg ella fakbólkar skulu siga frá sær verkfalsrætt á einum øki, so krevur tað afturbering á annan hátt.

Men onki hevur verið gjørt í 8 ár. Her hevur á ongan hátt verið víst rættstundis umhugsni.

### Skal loysast av pørtunum á arbeiðsmarknaðinum

Og tí liggur málið millum partarnar á arbeiðsmarknaðinum nú og frameftir: Landsstýrið øðrumegin, ið hevur 20 tinglimir aftanfyri seg. Og feløgini, sum samráðast hinumegin.

Vit hava ta greiðu støðu, at fer annar samráðingarparturin, ið hevur tann valdsmøguleikan, inn við lóg í eina arbeiðsósemju, so er arbeiðsmarknaðurin og frælsi samráðingarrætturin syndraður. Tá verða avleiðingarnar djúptøknar og møguleikarnir fyri eini siviliseraðari loysn á so grundleggjandi spurningum, skotnir langt út í framtíðina.

Tí kunnu vit í Tjóðveldi sum andstøðuflokkur bert gera hetta:

Heita á partarnar um at finna samráðingarloysn, og heita á partarnar um at taka neyðugu atlitini til at javnseta økini í landinum í einum møguligum verkfalli/verkbanni. Partarnir hava øll amboð til tess.

Leggja uppskot til samtyktar fyri tingið um, at landsstýrið í "friðartíð" skal taka upp samráðingar við avvarðandi fakfeløg á bæði almenna og privata arbeiðsmarknaðinum um at javnseta økini í landinum tá um samferðslu ræður, og fáa hetta málið loyst. Og tað vilja vit gera.